MÁLTEIGURIN

Føroyskt – íslendskt

At gera viðmerkingar til málfrøðingar í Sosialinum man lítið nytta. Teir málma sítt.

Hesa ferð (9.3.96) var tað vøddi ella vøddar teir høvdu so ilt av. Mikkjal á Ryggi nýtir orðið í Dýralæruni í 1935 fyri muskul, so heilt nýtt er tað ikki. At tað fyri 200 árum síðani var brúkt um tað tjúkka á legginum og reyvabøllan, forðar ikki fyri at tað í dag hevur fingið eina rúmari merking. Og tá tú hoyrir orð sum vøddamýkjari, sagt skemtiliga í fyrstuni, so veitst tú, at orðið verður verandi.

Men tað vóru ikki vøddar, eg hefti meg við, men tað at halda uppá, at hvørsfallsbenda orðið altið stendur framman fyri í føroyskum – hitt er íslendskt, siga teir í Sosialinum.

Blaðar tú í Steðanøvnum í Norðuroyum, sært tú, at tað yður við staðanøvnum, har hvørsfallsformurin stendur aftanfyri.

Nøkur dømi úr rúgvuni:

Mið Andreasar	Norðtoftir
Heyggjur Eyða	Svínoy
Heyggjur Atu-Ólavs	Svínoy
Kelda Rádna Prests	Hvannasund
Rætt Jóan Bónda	Árnafjørður
Sessur Skarðs Jógvans	Kunoy
Sessur Strandar-Jógvans	Kunoy

Munnu tað vera íslendingar, sum hava søkt bjørgini í Kunoy?

Janus Kamban

ROKKJALLARIN

Vit átaka okkum at selja fyri fólk.

Eisini keypa vit deyðsbúgv.

Rokkjallarin - Tlf. 11990

Tinghúsvegur 42 - 100 Tórshavn

Stuðulsfólk

Søkt verður eftir stuðulsfólki til tvey systkin, ávikavist 9 & 7 ár, í Eysturoynni.

Málið við stuðlinum er, í neyvum samstarvi við Almannastovuna, at virka fyri fremjandi tilboðum og avbjóðingum í gerandisdegum við týðiligari marksetan, og soleiðis menna og stuðla teimum likamliga, sálarliga og sosialt.

Ynskiligt er, at tann ið settur verður, hevur hóskandi fakliga útbúgving og royndir.


Arbeiðstíðin er 20 tímar um vikuna, at seta skjótast til ber og eitt hálvt ár fram.

Lønar- og setanarviðurskiftini eru sambært sáttmála millum Føroya Landsstýri og Føroya Pedagogfelag.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Almannastovuna, Eysturoyar deild, tlf. 48260, Bettina Christiansen.

Umsóknir við prógvskjølum mugu vera okkum í hendi í seinasta lagi 08.04.1996 og skulu sendast til:


Almannastovuna
Att. Bettina Christiansen
Eysturoyar deild
620 Runavík



KROSSORÐAGÁTA

Vinnari: Eirikkur Joensen, 690 Oyndarfjørður

Loysnin frá seinastu viku
Loysunarorðið: MARKNAÐUR



Hvønn leygardag

verður krossorðagáta í blaðnum. Drigið verður millum røttu innsendu loysnirnar. Vinningurin er ein av niðanfyri nevndu bókum frá Føroya Skúlabókagrunni. (Krossa av hvørja tú best kundi hugsað tær).

Fyri at verða við í dráttinum um vinningin, má loysunarorðið vera okkum í hendi *í seinasta lagi hósdagin.* Vinnarin verður saman við loystu gátuni kunngjørdur í blaðnum næsta leygardagin.

Sendið loysunarorðið til: **Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn** – og viðmerkið **»Krossorðagáta nr. ____«** á bjálvan.

Loysunarorðið: 58

Navn

Bústaður

Bygd/býur

Lesið føroyskt – hugsið føroyskt!

- ❑ **Fuglar í Norðurhøvum**
- ❑ **Stjórnarskipanarmálið 1946**
- ❑ **Spell at sólin kom upp**
- ❑ **Politiska søga Føroya 1814–1906**
- ❑ **Føroyskir soppar**
- ❑ **Døgurðabókin**
- ❑ **Søgan um eplið**
- ❑ **Heimsatlas**
- ❑ **Mannakroppurin – og hvussu hann starvar**
- ❑ **Alfagurt ljóðar mín tunga (fløga/ljóðband)**

Bøkur og annað tilfar – bæði innan og uttan skúlagátt.

FØROYA SKÚLABÓKAGRUNNUR